Eivind Jacobsen, stjóri í P/F Klaksvíkar Timburhandli:

# Fólk mugu hava ráð at leiga seg inn í eitt keypssentur í Klaksvík

**- Eg haldi, at tað er eitt gott hugskot at byggja timburhandilin um til keypssentur. Tað, sum eg hugsi mær, er, at vit kunnu hýsa fleiri ymiskum handlum undir sama taki á Stongunum – og ikki minst fyri ein rímiligan leiguprís. Vit hava ein hóp av handlum í Klaksvík, men sum eg havi skilt, geva flestu teirra lítið avkast. Tú fært tað í Klaksvík, sum tú fært aðrastaðni, men eg haldi, at tað hevði sett eitt veruligt »skump« í handilslívið her norðuri, um vit fingu eitt keypssentur við stórum og fjølbroyttum útboði, sigur Eivind Jacobsen**



*Keypssáttmálin varð undirskrivaður á Høvdanum á Strondum mikudagin. Eivind Jacobsen (v.m.) og Símun á Høvdanum taka í hondina á hvørjum øðrum. Aftanfyri teir standa (v.m.) Jógvan á Høvdanum og Petur Hans á Høvdanum*

KEYPSSENTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

P/F Klaksvíkar Timburhandil, sum Eivind Jacobsen og Símun Mittún saman við Norðoyagrunninum hava keypt frá Símuni á Høvdanum, bróðrinum, Peturi Hans og faðirinum, Jógvani, eigur fleiri bygningar í Klaksvík og á Borðoyavík.

– Faðir og synir keyptu timburhandilin í 1994, og so væl hava teir dugað at rikið fyritøkuna, at teir við árunum hava lagt fleiri bygningar inn undir seg aftrat, sum Eivind tekur til.

Hann sigur, at nú hann er vorðin stjóri og dagligur leiðari í P/F Klaksvíkar Timburhandli, sum framhaldandi er navnið á fyritøkuni, verður tað í fyrsta lagi uppgávan hjá honum at koma við hugskotum um, hvussu fyritøkan – við teimum ognum, hon eigur, verður skilabest rikin.

Spurdur, hvussu eigaraviðurskiftini eru, nú tríggir partar hava keypt P/F Klaksvíkar Timburhandil, heldur Eivind fyri, um tað ikki er hugsandi, at hann og Símun eiga á leið líka stóran part, meðan Norðoyagrunnurin eigur ein minni part.

Bæði seljari og keypari eru tó samdir um ikki at upplýsa keypsprísin.

Eivind heldur, at Símun í fyrsta lagi hevur áhuga fyri at verða við í verkætlanini sum íleggjari.

– Men tað kunnu tit spyrja Símun um sjálvan. Kenni eg mannin rætt, vil hann fegin vera íleggjari, um hann væntar, at ein fyritøka verður skilagott rikin, og eg ætli mær at gera tað, eg dugi fyri, at fyritøkan kann mennast á skilagóðan hátt – og tjena pening.

### Stórt fermetratal

Eitt av hugskotunum hjá Eivindi, nú handilin er framdur, og hann er vorðin stjóri og ein av eigarunum, er, at byggja timburhandilin á Stongunum um til keypssentur og flyta sjálva timburgoymsluna út á Borðoyarvík, har felagið eisini eigur bygningar.

– Eg haldi, at hetta er eitt gott alternativ. Tað, sum eg hugsi mær, er, at vit kunnu hýsa fleiri ymiskum handlum undir sama taki á Stongunum – og ikki minst fyri ein rímiligan leiguprís. Vit hava ein hóp av handlum í Klaksvík, men sum eg havi skilt, geva flestu teirra lítið avkast. Tú fært tað í Klaksvík, sum tú fært aðrastaðni, men eg haldi, at tað hevði sett eitt veruligt »skump« í handilslívið her norðuri, um vit fingu eitt keypssentur við stórum og fjølbroyttum útboði.

Eivind sigur seg hava hoyrt um ætlaninar, sum frammi hava verið um at byggja handilssentur í Klaksvík, men nú ætlanin er drigin so langt út, væntar hann, at henda verkætlanin er ov tung at bera – og ikki minst; at tað verður ov dýrt hjá teimum, sum skulu leiga seg inn.

Men hvat fer tað so at kosta at byggja timburhandilin um til keypssentur, spurdu vit Eivind?

– Tað verður ikki tann heilt stóra íløgan. Eg eri vanur at kunna byggja bíliga, og tað er neyðugt, um leigarar skulu kunna leiga hølir fyri ein rímiligan prís, sum eg haldi er fyritreytin fyri, at virksemið skal kunna liva og mennast.

Hann vísir á, at bygningurin á Stongunum, har timburhandilin húsast, kann umbyggjast, soleiðis at samlaða fermetratalið av gólvi verður einar 4.000.

– Sum er, hava vit einar 2.000 fermetrar av gólvvídd umframt einar 700 fermetrar á eini aðrari hædd. Verður gólv lagt í, har einki gólv er í dag, verður samlaða gólvvíddin á Stongunum soleiðis einar 4.000 fermetrar tilsamans.

Eivind sigur, at bygningurin á Stongunum er býttur í tvey, har P/F Klaksvíkar Timburhandil eigur norðara partin og Kjølbro-heilsølan hin syðra.

### Fjølbroyttur handil

– Ætlanin er, at amboðsdeildin verður verandi á Stongunum, meðan sjálv timburdeildin flytir út á Borðoyavík. Aftrat hesum kundi eg hugsað mær, at ein matvøruhandil og ymiskir aðrir handlar við ymiskum og fjølbroyttum útboði vóru undir takinum á Stongunum.

Eivind er tó í iva um, hvørt byggisamtyktin á økinum á Stongunum sum er loyvir fleiri sløgum av handlum, og tí noyðast nýggju eigararnir nú at venda sær til Klaksvíkar kommunu um hesi viðurskifti, um bygningurin skal umbyggjast og verða karmur um keypssentur.

– Vit kunnu ivaleyst bæði hýsa amboðsdeild og eitt nú matvøruhandli, ið kunnu relaterast til sjógvin og skipini – og tað er eingin loyna, at í slíkum handlum kann næstan seljast alt, ið hugsandi er. Men tað vildi verið keðiligt, tá ið handlar eru fluttir inn, at fingið at vita, at onkur teirra er í stríð við byggisamtyktina.

Hann vísir á, at matvøruhandlar partvís eisini selja klædnavørur og proviant til skip, men trupulleikar kunnu stinga seg upp, tá ið talan er um handlar, sum t.d. bara selja klæðir.

Eivind dylur heldur ikki fyri, at tað ikki er lætt hjá vanliga borgaranum at fáa greiði á, hvussu Klaksvíkar kommuna umsitir sínar byggisamtyktir, soleiðis sum fleiri dømir eru um.

– Hetta er bara ein veruleiki, leggur hann aftrat.

Nú teir hava keypt timburhandilin, sigur hann, at teir betur kunnu taka upp hesi viðurskifti við kommununa.

Hann hevur tosað við kommununa og tað næsta, sum fer at henda í hesum sambandi, verður, at teir fara at skriva eina umsókn til kommununa.

– Men eg trúgvi ikki, tað er nóg mikið bara við at skriva. Eg ivist onga løtu í, at fær kommunan bert eina umsókn, so verður svarið nei, og tað kunnu vit ikki brúka til nakað.

### »Strekkja« samtyktina

Eivind heldur, at um kommunan er líkinda góð at samstarva við, kann hon »strekkja« byggisamtyktina eitt sindur, og so kann málið loysast á tann hátt.

– Vit kunnu ikki fara at gera miljóna íløgur – og so seinni fáa at vita, at tað, sum vit hava gjørt, ikki er í samsvar við byggisamtyktina, leggur hann dent á.

Hann vísir eisini á, hvussu gekst, tá ið Jákup á Dul ætlaði at byggja ein nýggjan Skemmu-bygning í Klaksvík og misti pening upp á hesa ætlaðu verkætlan, tí kommunan setti seg upp ímóti henni.

– Vit minnast eisini, hvussu gekst hjá Brandal í Klaksvík, sum bíðaði eftir svari so leingi, at løgtings umboðsmaður mátti koma upp í leikin, sigur Eivind Jacobsen, sum annars vónar, at nýggju eigararnir av timburhandlinum og Klaksvíkar kommuna saman kunnu finna skilagóðar loysnir.

Hjá P/F Klaksvíkar Timburhandli starvast í dag 17 fólk.

# Timburhandilin í Klaksvík hevur verið væl rikin

**– Hetta er nýtt í mínari verð, so øll góð ráð hjá Símuni á Høvdanum og gomlu eigarunum eru kærkomin, sigur Eivind Jacobsen**

HANDILSLÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Umframt stóra bygningin á Stongunum í Klaksvík, sum kann byggjast um til eina gólvvídd upp á einar 4.000 fermetrar, eigur P/F Klaksvíkar Timburhandil eisini stóran bygning á ídnaðarøkinum á Borðoyavík, sum NCC í løtuni leigar – og við síðuna av honum eigur timburhandilin eisini bygningar úr betong, eitt nú gamla spinnaríið, sum er tvær ferðir 440 fermetrar tilsamans. Aftrat hesum eigur timburhandilin ein bygning á Skarðhamri, sum er á eystursíðuni á Borðoyavík. Hesin er einar 500 fermetrar til víddar.

– Jú, eg má siga, at tað hevur gingið væl hjá timburhandlinum, síðan faðir og synir keyptu hann fyri stívliga 10 árum síðan, sigur Eivind Jacobsen, sum annars er trímenningur til fyrrverandi stjóran, Símun á Høvdanum og bróður hansara, Petur Hans.

Hann heldur, at teir hava dugað ógvuliga væl at rikið »forrætning«, og nú Símun ikki er eigari meira, sigur Eivind, at hann fer at »súgva« ta vitan til sín, sum hann Símun hevur at geva honum.

– Hetta er nýtt í mínari verð, so øll góð ráð hjá Símuni á Høvdanum og gomlu eigarunum eru kærkomin, sigur Eivind Jacobsen, sum annars er ógvuliga spentur upp á hesa avbjóðing og teir møguleikar, sum P/F Klaksvíkar Timburhandil hevur fyri framman.